# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Politisk óvissa

Synd at siga, at politiska støðan er vorðin greiðari eftir ruðuleikan á tingi seinasta fríggjadag. Tjóðveldið lýsti lógaruppskotið um vinnuliga fiskiskap sum kabinetsmál, og boðaði frá, at 20% niðurskurður í fiskidøgum var minstamarkið, sum flokkurin kundi liva við. Hetta fall, og so skuldi Tjóðveldi verið úti. Men í politikki er sum kunnugt ikki altíð samanhang millum orð og gerð. Eftirfylgjandi fekk formaður Tjóðveldisins kravboð frá floksleiðsluni, um at vera verðandi í samgonguni og at fáa samgongugrundarlagið víðkað. Kabinetsmálið, var kanska ongantíð ætlað sum eitt veruligt samgonguslit, men var bert ætlað at skapa disiplin í egnum røðum, ella við øðrum orðum at trýsta Heina og aðrar møguliga ivandi sálir.

Løgmaður hevur boðað frá, at hann kundi hugsað sær at fingið annan av teimum stóru flokkunum upp í samgonguna. Hann hevur sostatt hug at royna tað sama sum Tjóðveldi og sigur við útvarpið hjá Kringvarpinum, at hann fer at boða fyrst formanni Sambandsfloksins og síðan formanni Fólkafloksins til politiskar samrøður.

Skal farast eftir tí, sum hesir báðir formenn siga undan samrøðunum, verður hetta lættari sagt enn gjørt hjá løgmanni. Hvørgin teirra fer upp í samgonguna fyri at hjálpa til at reka sama politikk, sum higartil er rikin. Hetta skal skiljast sum, at talvan skal turkast rein og byrjast skal heilt frá botni við heilt nýggjum samgongusamráðingum. Báðir floksformenn løgdu stóran dent á hetta, at politikkurin hjá teirra flokkum skuldi síggjast aftur í einum komandi samgongugrundarlagi, um løgmaður skal gerast sær nakra vón um at fáa til vega eitt breiðari samgongustøði.

Hvussu eru so útlitini fyri eini breiðari samgongu, og hvat hugsar løgmaður um, tá hann talar um at fáa ein av teimum stóru flokkunum upp í samgonguna. Hvussu eru útlitini til at hetta fer at eydnast honum? Nú var løgmaður ikki serstakliga greiður í síni melding, men tað fær hann heldur ikki verið, sum støðan er. So mikið tykist tó greitt, at hann nú tykist til reiðar at avskriva Sjálvstýrisflokkin. Hinvegin bendir nógv á, at hann vil varðveita Miðflokkin í eini endurskipaðari samgongu. Hann miðar sostatt móti eini samgongu við fýra flokkum, nakað sum fer at gera samráðingarnar truplar. Herviðverður ikki sagt, at uppgávan er óloysilig. Tað, sum stuðlar uppundir hesa loysn, er, at ongin flokkur tykist vilja hava løgtingsval her og nú. Hetta man vera besti trumfur løgmans í komandi samgongusamráðingum. Sjálvur hevur løgmaður eftir seinastu veljarakanning allar orsøkir til at sleppa undan at skriva út val, hóast eitt løgtingsval, sum støðan er vorðin, hevði helst verið tann mest demokratiska leiðin úr tí politisku óvissu, sum valdar i løtuni.

**Sosialurin**

PRIMA NOCTE:

## Koyrið uppskotið hjá Tobba í ruskspannina

JÓANNES PATURSSON

”Nýggj landbúnaðarlóg” er borin í Tingið. Sambært samgonguskjalinum eigur landbúnaðarlóggávan at endurskoðast, og vanliga roknast við, at ábøtur skulu gerast. Tí er tað einki minni enn eitt sjokk at síggja tey veldugu afturstig í hesi lóg.

Høvuðsgrundgevingin er, at forðast skal fyri spekulasjón millum bóndur. Og við hesi grundgeving verður alt sorlað sundur, sum sambært lógini frá mai í fjør, gav bóndanum eitt lítið vet av avgerðarætti yvir sínum arbeiðsplássi.

Eitt er so grundgevingin, men hvar er veruligi vandin? Kann tilfeingismálaráðharrin vísa okkum eitt einasta dømi um spekulasjón eftir lógini frá mai í fjør, ið rættvísger so ógvuslig inntriv í landbúnaðarlógina?

Ótrúligt at tann maður, ið ofta rópar harðast um frælsi til fólkið í hesum landi býr, skal verða sami maður sum ætlar at niðurbinda ein heilan samfelagsbólk, tekur nývunnin rættindi frá teimum, og leggur til sín sjálvs at umsita. Ikki bert at umsita, men nærum detailstýra hvørjum einasta festi í Føroyum. Tað er líka við at landstýrismaðurin fær góðkennandi myndugleika yvir, hvønn maka festarin kann fáa sær.

Ótrúligari er tað, at ein tjóðveldismaður skal fara og hálova teimum skipanum, danakongar løgdu útyvir hetta fólk, og sum vóru avskaffaðir longu í 1786 í Danmark. Vit vóru eitt elalítið fet á rættari kós. Men nú skal henda avoldaða og primitiva skipan setast aftur í gildi.

Harraguð, sjálvt Russland hevur sæð andsøgnina og ineffektivitetin í at ”landið eigur”, og enntá á Kuba eru tey so smátt farin frá hesum skipanum, hetta átti at fingið onkrar klokkur at ringt.

Um tit endiliga vilja avhøvda vinnuliga landbúnaðin í Føroyum, kalli so ein spaka fyri ein spaka.

Hetta primitiva lógaruppskotið vantar bert eina reglu fyri at verða fullgjørt. Tá nú tilfeingismálaráðharrin sær seg sjálvan sum betri bónda enn festaran, eigur hann at skoyta uppí rættindini sum enski aðalin helt seg hava mótvegis skotum. PRIMA NOCTE.

Hetta, tí at enn eru arvalógirnar galdandi, og á henda hátt vildi hann (um enn spakuliga) fingið beinleiðis ávirkan á øll festini. Haldi eitt slíkt ískoyti hevði verið á á leið sama barbariska støðið sum restin av lógini.

”Teir, ið vilja valda skulu teir eisini gjalda”, verður ofta borið fram. Gangi so bara út frá, at skal tað verða grundreglan, eigur hetta at innførast í landbúnaðinum við. Vil landið framhaldandi valda, eigur landið at gjalda. Ein byrjan kundi verið at landið fer at gjalda fyri tað, ið stendur á festibrøvunum (landsins ognum). Hvør annar eigur ognir uttan at gjalda fyri tær?

Kanska kundu tit so sett bóndan í starv, og givið bóndanum somu góðu sømdir sum løgtings- og landstýrisfólk, bæði við lønum og feitum eftirlønum, fyri at røkja landsins ognir. Men nei. Øll gjøld hvíla á festaranum.

Vita føroyingar í heila tikið av, at festibóndin skal seta privatar ognir í veð fyri at lána úr Búnaðargrunninum til íløgu ella røkt av landsins ognum?

Veit nakar um nakað annað land, har privatfólk skulu seta privatar ognir í veð fyri røkt av almennum ognum?

Vildi fegin sæð Tobba á brúnni á skipi, við keppi og balli í kinnklovanum, sett seg sjálvan í skuld uppum bæði oyru til røkt, viðlíkahald og íløgu, og tá alt kom til alt, átti landið skipið. Missir hann skipið, hongur skuldin á honum, og tá verður tað ein samráðingarspurningur millum ein møguligan nýggjan festara og landsstýrið, um Tobbi framhaldandi skal eiga lánini, ella tann nýggi festarin tekur tey á seg, tá hann yvirtekur skipið. Tobbi sjálvur verður ikki eftirspurdur….

Annars er tað hvørki serliga hugkveikjandi fyri okkum, ið liva og virka í hesi vinnu, at síggja politiska myndugleikan vísa okkum so lítið álit.

So vónandi eru tit, okkara tingfólk, so mikið at tykkum komin, at tit beina hetta lógaruppskot beinaleið í ruskspannina, har tað hoyrir heima, hetta vóni eg tit gera longu við, ella áðrenn, fyrstu viðgerð.

## Kári á Rógvi speirekur Heina

JÓGVAN Á LAKJUNI



Vinnuumboð og útróðrarmenn klappaðu ikki fyri niðurskurðinum upp á 10%, men tí tað eydnaðist hjá okkum í andstøðuni saman við Heina O. Heinesen at avmarka ørskapin hjá samgonguni og Kára á Rógvi.

Kári á Rógvi hevur eina sera ljóta og speirekandi lýsing av Heina O. Heinesen á heimasíðu Sjálvstýrisfloksisfloksins eftir tað, sum hendi á tingi fríggjadagin.

Eg haldi, at tað sømir seg ógvuliga illa soleiðis við happandi skriving at gera gjøldur burtur úr ellisformanninum á tingi, sum í gjár vísti, at hann ikki bognaði undir trýsti.

Vinnuumboð og útróðrarmenn klappaðu als ikki fyri niðurskurðinum upp á 10%, sum Kári lýsir tað, men tí tað eydnaðist hjá okkum í andstøðuni saman við Heina O. Heinesen at avmarka ørskapin hjá samgonguni og Kára á Rógvi.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.